

Fyribilsstørv
sum **málsviðgeri**
á Almannastovuni

Á Almannastovuni starvast 100 starvsfólk. Á Veitingardeildini starvast 8 málsviðgerar, 2 fulltrúar og 1 deildarleiðari.

Hevur tú hug á royna teg í einum arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning, so eru tvey fyribilsstørv sum málsviðgeri á Veitingardeildini á Almannastovuni leys at seta skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar fáast við at venda tær til Tummas E. Djurhuus, deildarleiðara, á tel 353510 ella á portal.fo og almannastovan.fo

*Umsóknarfreistin er fríggjadagin 26. mai 2006.*

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80



# Málsviðgeri
## á Almannastovuni

Á Almannastovuni starvast 100 starvsfólk. Á Veitingardeildini starvast 8 málsviðgerar, 2 fulltrúar og 1 deildarleiðari.

Hevur tú hug á royna teg í einum arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning? So er eitt fulltíðarstarv sum málsviðgeri á Veitingardeildini á Almannastovuni leyst at seta frá 15. juni 2006.

Nærri upplýsingar fáast við at venda tær til Tummas E. Djurhuus, deildarleiðara, á tel 353510 ella á portal.fo og almannastovan.fo

*Umsóknarfreistin er fríggjadagin 26. mai 2006.*

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80






Njótið Ísland í hálvanannan dag. Síggið víddirnar, stórfingna mánalandslagið og baðið í heitum keldum. Hugnið tykkum á túrinum við góðum mati, avslapping og shopping.

Ókeypis gisting umborð á Norrønu náttina millum týsdag og mikudag. Týskvøldið verður dansur við livandi tónleiki.



Møguleiki er at taka egnan bil við og koyra hagar einum lystir. Eisini er møguleiki at luttaka á skipaðu útferðunum.

* Ferð fram og aftur í couchettu.
Kamar u/vindeyga: kr. 500,- fyri kamarið.
Kamar v/vindeyga: kr. 700,- fyri kamarið.
Persónbilur kr. 500,-. Øll avgjøld íroknað.
Prísirnir eru ikki galdandi fyri luksuskømur!

**ÚTFERÐIR** (keypast umborð)

**MÝVATN (týsdag til mikudag)**
Vitjið náttúruperluna Mývatn og upplivið gandakendu náttúruna við dølum, fjallaskørðum og oyðnum gosplássum. Slappa av í heita geotermiska vatninum í nýggja Mývatn Náttúrubaðnum.

**AKUREYRI (týsdag til mikudag)**
Á veg til Akureyrar sært tú stórsligna og gátuføra náttúru og vakrar fossar. Gist verður á Hotel Krea mitt í býnum. Hotellið er 4-stjørnað.

**SEYÐISFJÖRÐUR (mikudag kl. 13)**
Túrurin varir uml. 3½ tíma. Vitjað verður á áhugaverdum støðum í býnum. Íslendskur ferðaleiðari er við á túrinum.

**EGILSSTAÐIR – 4 TÍMAR**
Umframt Egilsstaðir verður vitjaður Hallormsstaðarskógur, Skriðuklaustur, savnið Fljótsdalur, Haifossur og Fellabær.

# Tekniskur stjóri
# til Tórshavnar kommunu



**Ábyrgdarøki**
Saman við borgarstjóra, kommunustjóra, trivnaðarstjóra og miðfyrisitingarstjóra mannar tekniski stjórin leiðslutoymið í kommununi og kemur í samstarvi við politiska myndugleikan at raðfesta uppgávurnar og leggja til rættis kommunalu ætlanirnar.

Tekniski stjórin er ovasti leiðari fyri teknisku fyrisitingini við tilvísing til kommunustjóra og borgarstjóra. Næstu medarbeiðarar eru býarverkfrøðingurin og býararkitekturin, sum er byggifulltrúi.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávan verður at stjórna og samskipa arbeiðsøkini í teknisku umsitingini og hava umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina um hendi.

Tekniski stjórin er sambindingarliður millum teknisku umsitingina og politisku skipanina og skal ansa eftir, at lógir, reglugerðir og samtyktir verða fylgdar.

Tekniski stjórin skal eisini tryggja, at fyrisitingin hevur gott samskifti við borgaran, viðskiftafólk og landsstovnar.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir einum stjóra við akademiskari útbúgving, og sum hevur áhugað fyri og hollan fíggjarligan og fyrisitingarligan kunnleika. Arbeiðið krevur virðing og fatan fyri politisku skipanini.

Harumframt vænta vit, at stjórin hevur leiðsluroyndir og er førur fyri at taka avgerðir. Vit vænta eisini, at hann er áhugaður í býarskipanarligum viðurskiftum, býarvarðveiting, náttúru- og umhvørvismálum og tekniska økinum sum heild. Vit leggja stóran dent á góð samstarvsevni og ein jaligan hugburð.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv og verður lønt í 38. lønarflokki við tvey ára royndartíð.

**Umsókn**
Umsóknir saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 6.juni 2006 kl. 12:00. *Viðmerkið umsóknina: Tekniskur stjóri.*

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, á tlf. 302010.

Tórshavnar kommuna

REPROZ